





# Jólini heima hjá Jenisi tingmanni

**Jólamánaðurin hevði kenst myrkari og longri og lívið hevði verið bæði tyngri og fátækari, um ikki Hann var komin, sum vit minnast hesar dagar. Av sonnum hevur Hann uppiborið tann heiðurssess, sum vit eiga at bjóða Honum í heimum og lívi okra, - ikki bert jóladagarnar, men hvønn dag í árinum. Frelsarin, sum doyði fyri okkum og sum bjóðar okkum sín frið, sína gleði og sín tryggleika.**



Eftir Jenis av Rana, tingmaður

Jól okkara í 2009 vóru hugalig at síggja fram til.

Tá bíðaðu vit spent eftir at fáa alla familjuna heim til høgtíðina. Yngsti sonurin kom úr Keypmannahavn, teir báðir eldru og verdótturin úr Oslo og ikki at gloyma ommu- og abbasynirnir, 3 og 1 ár, sum tá búðu í Oslo.

Gott var at fáa tey heim, og hvør dagur var ein sonn njótan. At kunna fara í býin at keypa gávur við teimum yngstu, kendist sum at vera ungur aftur, og barnsliga gleðin jólaaftan verður ikki gloymd í bræði.

Í ár verða ommu- og abbasynirnir og foreldur teirra í Noregi. Hagar fara vit á vitjan á nýggjárinum, til Verdalen, ið er beint við Stiklastaðir. So jólahátíðin verður nakað øðrvísi í ár. Kanska verða fleiri gongutúrar og vitjanir og meira lisið, men vónandi ikki meira etið!

Annars er gásin yndisfuglurin, bæði hábærsligi livandi fuglurin og framúr leskiliga steikin á borðinum jólaaftan.

**HEIÐURSSESS**

*- Frelsarin hevur av sonnum uppiborið tann heiðurssess, sum vit eiga at bjóða Honum í heimum og lívi okra alt árið, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður*